# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

B71-EB/Streymur:

## Hørð byrjan hjá B71

**Eftir at hava tapt móti meistarunum í fyrsta umfari skulu sandoyingar nú spæla heimadyst móti varameistarunum og steypavinnarunum úr EB/Streymi**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað reið um snarið, tá B71 í fyrsta umfarinum byrjaði við truplastu møguligu uppgávuni. Á útivølli móti NSÍ.

Hesa ferð er setningurin nærum eins trupul, tá teir á heimavølli taka móti EB/Streymi, sum í fjør vann silvur í landskappingini.

B71 verður av fleiri spátt at fáa eina tilveru nær botninum, men sjálvir hava teir støðugt sagt, at málið er hægri enn so. Og við miðvikusigrinum á AB er sjálvsálitið hjá spælarunum eisini í toppi. Ikki minst hjá Rasmusi Nielsen, sum við einum reinum hattrick mest sum sópaði argjamenn burtur mikukvøldið.

Hjá EB/Streymi er setningurin eisini trý stig, um teir aftur í ár vilja hava ein leiklut heilt frammi í oddinum. Hesa ferð mugu teir tó vera Bárð Olsen fyriuttan, eftir at hann fekk reytt kort, tá EB/Streymur fyri aðru ferð innan fýra dagar vann á KÍ.



*Í fjør vann EB/Streymur báðar dystirnar, tá teir vitjaðu á Sandi*

B36-Víkingur:

## Nýggir B36'arar royna seg

**Dmitrij Jankovic er tøkur eftir leikbann, og møguliga er nýggjur nigerianskur áleypari í hópinum, tá B36 tekur móti Víkingi**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir 4-0 sigur í fyrsta dystinum er sjálvsálitið í hópinum hjá B36 gott. Talan er í nógvar mátar um eitt ungt lið, sum nú skal byggjast upp, og tó at umdystur og brotsspørk skuldu til, áðrenn B36 fekk sent 07 Vestur úr steypakappingini, so er lagið í hópinum gott eftir fyrstu tveir teljandi dystirnar.

Talan var tó um ein smeit, sum liðið fekk, tá Ingi Højsted noyddist skaddur av vøllinum í Sørvági. At byrja við bóru menn ótta fyri, at talan aftur var um liðbandsskaða hjá óhepna miðvallaranum, men heilt so galið er tað kanska ikki skilst.

Ingi verður tó ikki við um vikuskiftið, men tað verður Dmitrij Jankovic, sum í vetur kom til felagið úr VB/Sumba. Jankovic hevur havt leikbann, men nú er hann so tøkur at traðka inn í B36-verjuna. Og møguliga hevur felagið eisini fingið álopsstyrk. Undan evstamarkinum fyri spælaraflytingar deponeraði B36 spæliloyvið hjá einum nigerianskum framherja hjá FSF. Tá vit frættu hóskvøldið, var enn ikki greitt, um alt pappírsarbeiðið var liðugt undan vikuskiftinum, men arbeitt verður av øllum alvi við hesum.

Víkingur byrjaði eisini sítt kappingarár væl, tá teir mánakvøldið vunnu greiðan sigur á B68. Í fjør var Víkingur ikki partur av Formula-deildini, men GÍ treivst væl, tá teir vitjaðu í Gundadali, og ivaleyst ætlar nú samansetta liðið at halda fast í teirri siðvenjuni.

ÍF-Skála:

## Jones er lendur

**David Jones stendur við stýrisvølin, tá ÍF sunnudagin tekur ímóti Skála**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Venjarspurningurin hjá ÍF er nú loksins avgreiddur. Við flogfarinum í gjár var David Jones, og sum vera man fegnast tey í Fuglafirði um, at venjaraspurningurin nú loksins er loystur.

- Givnu umstøðurnar gjørdu alt eitt sindur keðiligt, og nevdarskiftið, sum vit hava havt, hevur kanska eisini órógvað í so máta. Men nú er David Jones so á veg norður til Fuglafjarðar, segði Dan Petersen, sum er nýggjur formaður í ÍF, tá vit høvdu orðið á hann í gjárkvøldið.

Soleiðis verður bretski venjarin á beinkinum, tá ÍF spælir eysturoyaruppgerð móti Skála í einum dysti, sum longu nú líkist einum lykladysti. Ikki minst, tí bæði liðini vóru fyri hvør sínum greiða tapi í Gundadali fyri viku síðani.

Ta ferðina fekk Alexander Jovevic reyða kortið, og hann er tí leikbannaður til dystin móti Skála.

Hjá Skála ræður um at reisa seg eftir stórtapi móti HB. Til uppgávuna er líkt til, at liðið hevur Paula G. Hansen tøkan, so hann aftur kann stýra miðvøllinum. Hinvegin fekk Jógvan G. Joensen skaða móti HB, og hann er neyvan tøkur. Tosað hevur verið um, at Alexandur Johansen og Bárður B. Danielsen nú aftur fara undir fótbóltin, men enn hava teir so ikki verið partur av venjingunum hjá Skála.